# handVERKARIN

2013 BLAÐ NR. 45 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# HENT OG GÓÐ RÁÐ HJÁ LIMUNUM Í HAVNAR HANDVERKARAFELAG

### Limagjald og lívstrygging:

Limagjaldið er kr. 500,00 um mánaðin, tá limir hava gjaldsavtalu. Í limagjaldinum er íroknað gjald fyri lívstrygging og gjald fyri sjúkragrunnin BATA.

Kr. 75,00 verða lagdar afturat í ómaksgjaldi hjá teimum, sum ikki hava fasta gjaldsavtalu.

### Tímaløn:

Tímalønin frá 1. okt. 2012: Kr. 126, 54 (minstaløn )
3-ára starvsaldur gevur 1,6% lønarhækkan.
Frítíðarløn: 12%
Konta 6460-299.601.6 og 9181-299.700.4

### Eftirløn:

Arbeiðsgevarin: 13%
Løntakarin: 2%
Tilsamans: 15%
Konta: 9870-9905597

### Sjúkragrunnurin BATI: Er bert fyri limir í Havnar Handverkarafelag

Gjaldið til BATA er frá 1. mars 2013 í limagjaldinum
Umsiting: BATI
Postboks 203, 110 Tórshavn
Tlf. 354800 – fax 354801

### Lærlingar:

Lærlingar gjalda kr. 10,- pr. viku í limagjaldi.
Konta: 6460-401.200.5

### Lærlingalønir ( % av sveinalønini )

1. árið 32%
2. árið 40%
3. árið 45%
4. árið 55%
5. árið 70%

Eftirlønir til lærlingar: 7,5%
Konta: 9870-9905597

### Eftirútbúgvingargrunnurin VITAN

Arbeiðsgevarin: 10 oyru pr. tíma (eftir skatt )
Løntakarin: 10 oyru pr. tíma (eftir skatt)

### Umsiting: Vinnuhúsið

Postboks 1039, 110 Tórshavn
Tlf. 309900 – fax 309901
Teldupostur: mikkjal@industry.fo
Konta: 9181 – 495.879.0
Konta: 6460 – 101.278.0

### Í blaðnum hesa ferð:


| | síða |
|---|---|
| Ársfrágreiðing Havnar Handverkarafelag: árið 2012 | 4 |
| Eftirlønargrunnurin ársfrágreiðing 2012 | 18 |
| Eftirlønargrunnurin rakstrarroknskapur | 26 |
| Sjónarhornið: Danjal P. Djurhuus | 27 |
| Um fólkapensjónina, Páll Nielsen | 28 |



Útgevari: Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
Ábyrgdarblaðstjóri: Eli Brimsvík
Blaðstjórn: Media · Umbróting, prent og liðugtgerð: Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Skrivstovutíð: Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverkarin@handverk.fo · www.handverk.fo


## STÁSILIG HØLIR TIL YMISK ENDAMÁL





Hølini verða útleigað til limir og onnur uttan fyri felagið.
Talan kann vera um feløg, stovnar ella einstaklingar.

# ÁRSFRÁGREIÐING HAVNAR HANDVERKARA FELAG: ÁRIÐ 2012



*Eli Brimsvík*

2012 var eitt rímiliga friðarligt ár, tá talan er um ósemjur, tó so, tað slepst nokk ongantíð heilt undan hesum fyribrigdi. Onkur mál hava verið viðvíkjandi manglandi løn/eftirløn. Hetta vísir okkum eisini, sum vit fyrr hava sagt, at tað er alneyðugt, at limirnir eisini sjálvir fylgja væl við og kanna um arbeiðsgevarin nú rindar tað hann skal. Her kann eg eisini minna á, at limirnir eru altíð væl komnir at venda sær til skrivstovu felagsins hesum viðvíkjandi. Tað er ikki altíð líka lætt at fáa viðhald í einum kravi móti arbeiðsgevara um ein hevur víst „passitivitet"; tað vil siga, ikki hava gjørt vart við trupulleikan á røttum stað. Tað kann t.d. vera ov seint ella ikki líka lætt at seta kravið, tá ein er farin úr starvi hjá einum meistara. Og so mugu vit eisini nevna, at so at siga allir meistarar halda sína skyldu.

## Lógarbroyting

Av tí, at Eftirlønargrunnurin ikki var klárur til aðalfundin, sum var lýstur at vera í mars, var avgerð tikin um at útseta báðar aðalfundirnar til 30. apríl 2013. Orsøkin var, at broytingar, sum umfata útgjaldspartin í skrásetingarskipanini hjá Eftirlønargrunninum, máttu gerast í ár. Hetta var eitt sindur keðiligt, men vit hildu, at tað at hava tveir aðalfundir við so tøttum millumbili tænti ongum endamáli. Hinvegin er eingin ivi um, at vit sambært viðtøkunum eiga at hava aðalfund í fyrsta kvartali á hvørjum ári.

Lat meg her nevna, at vit til hendan aðalfundin seta fram uppskot um at broyta § 20 í viðtøkunum soleiðis, at ársaðalfundurin hjá felagnum fylgir ársaðalfundinum hjá Eftirlønargrunninum. Tað hevur so við sær at aðalfundirnir hjá felagnum og Eftirlønargrunninum altíð verða sama dag.

## LÍV

Sum nógvir limir okkara helst hava frætt, so tóku fleiri fakfeløg seg saman við tí endamáli at keypa Tryggingarfelagið LÍV. Vit fingu eisini áheitan, men av tí, at vit hava okkara egna Eftirlønargrunn, so takkaðu vit nei. Í hvussu er fyri fyrst. Vit kunnu siga, at vit vita, hvat vit hava, men ikki hvat vit fáa um vit fara inn í eitt slíkt mál. Og tað vísti seg eisini, at tey 18 feløgini, sum ætlaðu at keypa fingu trupulleikar, tí Tryggingareftirlitið ikki vildi góðkenna teirra boð.

## Lívstryggingin

Allir limir, sum ikki eru í limagjaldseftirstøðu eru lívstryggaðir. Tað vil siga, at gjaldið fyri lívstryggingina er partur av limagjaldinum.

Vit hava í mong ár haft okkara lívstrygging hjá danska tryggingarfelagnum ALKA.

Her kunnu vit nevna, at aftur í ár mugu vit sanna, at okkara lívstrygginarskipan er komin væl við hjá fleiri limum. Fleiri limir hava seinasta árið fingið útgoldið tryggingarveiting.

Men nú var so mett, at tíðin var búgvin til at endurskoða tryggingaravtaluna, og kanna marknaðin.

Í hesum sambandi heittu vit á ein tryggingarráðgeva um at kanna um vit ikki kundu fáa eina betri lívstrygging.

## Nýggja lívstrygging í 2014

Kravið hjá okkum var, at verandi rættindi skuldu fylgja við til ein komandi veitara. Tað vil siga, at eingin limur mátti detta niður millum skipanirnar, um tað bleiv ein annar veitari enn ALKA. Í hesum sambandi fingu vit tilboð frá ALKA, LÍV og Betri Pensjón.

Tilboðið, sum vit nú hava tikið av, og sum helst verður galdandi frá 1. januar 2014, er frá Betri Pensjón, og er mett at vera best og bíligast.

Tað er so eftir tilmæli frá tryggingarráðgevanum, at vit hava valt Betri Pensjón til lívstryggingina komandi 3 árini.

Her eigur at vera gjørt vart við, at avtalan við Betri pensjón er undirskrivað við tí fyrivarni, at aðalfundurin góðkennir avtaluna. Eg vil her nýta høvi til at nevna, at felagið hevur havt eitt serstakliga gott samstarv við ALKA síðani 2005. Men tíðin var nú komin til, at endurskoða lívstryggingina.

Í framtíðini eigur helst at verða so, at tað er nevndin, og ikki aðalfundurin, sum skal góðkenna slíkar avtalur. Nevndin metur, at tað er ein ov tung skipan, at kalla inn til eykaaðalfund hvørja ferð broytingar skula gerast í lívstrygginginí. Men tá vit gjørdu avtalu við ALKA, var tað aðalfundurin, sum samtykti tað, og tí leggja vit nýggju avtaluna fyri aðalfundin at góðkenna.

## EL & IT

Í august mánað høvdu vit vitjan av EL & IT forbundinum í Noregi. Ferðalagið taldi 9 fólk.

Fundast var – sum vera man – um ymisk viðurskifti. Talan var t.d. um samstarvið við Pam Offshore og Faroe Offshore.

*Framhald á s. 8*




SPEKT kann hjálpa tær við
Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum
SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. - Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir grannskoðarar


Ídnaðar- og garaguhurðar
Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92
Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn


rør-tænastan
v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80
Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión


SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR
www.tst.fo
skapandi umhvørvi
Tekniski Skúlin
.... ein virkin og góður samstarvsfelagi
Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling
• vit seta lærlingin í miðdepilin
• vit nøkta tørvin hjá vinnuni
• vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika
Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo


Ein depil innan skipatænastur
www.mest.fo
At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.
Men MEST er eisini so nógv annað.
Vit bjóða m.a.
• Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
• Landsins størstu goymslu av eykalutum
• Projekt- og teknistovuarbeiði
• Stórar bedingar og turrdokk
• Leigu av sleipibátum og kranum
• Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)
MEST
MEST
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

# ÁRSFRÁGREIÐING HAVNAR HANDVERKARA FELAG: ÁRIÐ 2012



Hettar er ein vinna, sum veksur stútt. Vit hava í løtuni nógvar limir í starvi har, og tí er avgjørt neyðugt at viðlíkahalda sambandi við norsk fakfeløg.

Ferðalagið vitjaði t.d. Vinnuhúsið og Tekniska skúla og hjá Skipasmiðjuni MEST.

Um kvøldið var hugni í hølunum hjá felagnum saman við nevndini. Alt í alt ein góður túrur, sum teir vóru sera væl nøgdir við.

## Oljuráðstevna

Í viku 39, frá 24. til og við 28. september, vóru trý umboð fyri Havnar Handverkarafelag boðin til Stavanger á oljuráðstevnu hjá EL & IT.

Tey trý, sum umboðaðu felagið vóru: Sofus, Palli og undirritaði. Hetta var ein upplýsandi og áhugaverdur túrur. Vit fingu høvið at vitja nakrar av okkara limum, sum starvast í Eggersund, har vit sóu ein part av arbeiðinum, sum føroyingar gera.

Sum vit fyrr hava nevnt, fingu okkara limir rós fyri teirra ágrýtni og handalag.

Slíkar vitjanir eru gull verdar fyri samstarv felagsins við EL & IT, og limir okkara, sum arbeiða í Noregi.

Slíkar vitjanir gera, at tað verður nógv lættari at samskifta. Her hugsi eg um, at tá møguligir trupulleikar stinga seg upp so er nógv lættari at samskifta við fólk, sum man hevur hitt og kennir frammanundan.

## Lønarsamráðingar

Lønarsamráðingar vóru á heysti 2012, men tað er synd at siga, at nógv var at heinta. Vit fingu einans 3,2% uppá lønina yvir 2 ár; og ikki kann tað sigast at vera nógv. Men tað var so tað, sum vit kundu uppnáa. Soleiðis sum eg síggi tað, er tað ein trupulleiki, at okkara samráðingar altíð eru í oktober mánað, meðan onnur feløg eru til samráðingar í mai mánað. Av tí sama er støðið undir okkara samráðingum lagt fast áðrenn vit koma til samráðingarborðið. Vit hava roynt at fáa hetta broytt, men her er Vinnuhúsið ikki at vika. Tað sama kunnu vit siga um partar av Føroya Handverkarafelag.

## KAF

Í løtuni eru samráðingar við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið KAF. Tað snýr seg um at fáa ein sáttmála fyri handverkarar, sum eru í kommunalum starvi. Ætlanin er, at hesin skal umfata allar handverkarar; eisini hallarvørðar, sum eru í starvi hjá kommununum.

## Tekniski Skúlin

Í 2012 høvdu vit kunnandi fundir við næmingum á Tekniska skúla. Hetta hevur verið væl móttikið og avgjørt tiltrongt. Nógvir av lærlingum kenna als einki til síni rættindi og, hvat fakfeløg annars standa fyri. Við slíkum tiltøkum kunnu vit hjálpa næmingunum.

Fyri stuttum var nýtt stýri valt fyri Tekniska skúla, og hesiferð eydnaðist okkum at fáa næstformannin. Tað fegnast vit um.

## Eftirstøða av limagjaldi

Eftirstøðan av limagjaldi er minka nógv seinastu árini, og nú eru so gott sum allir limir við í Gjalds Skipanini, og allir nýggir limir vera meldaðir til hesa skipan. Tað lættir nógv um bæði hjá okkum og – ikki minst – hjá liminum sjálvum.

Endamálið hjá felagnum er sjálvandi, at ongin limagjalds-eftirstøða skal vera.

Her skal undirstrikast, at starvsfólk okkara eigur stórt rós uppiborið fyri gott og uppfylgjandi arbeiði.

## Sakarmál

Í løtuni hevur felagið tvey sakarmál koyrandi fyri limir móti almennum arbeiðsgevara. Tað



# ÁRSFRÁGREIÐING HAVNAR HANDVERKARA FELAG: ÁRIÐ 2012



eru mál um tvungnan limaskap í ávísum felag, sum treyt fyri framhaldandi starvi, og ósemju um vaktargjald við meira.

Eg kann eisini nevna, at felagið hevur reist onnur sakarmál vegna limir. Tað eru sakarmál, sum hava samband við manglandi løn og eftirløn. Tey eru send advokati til innheintingar. Og so kunnu vit nevna, at vit í løtuni fyrireika mál, sum møguliga verða løgd fyri fasta gerðarrættin at taka støðu til.

## Útbygging

Líka síðan felagið flutti í ognina í Stoffalág hevur verið arbeitt við ymiskum møguleikum at útbyggja og bjálva húsini. Nú eru vit komin so mikið langt, at vit hava fingið trý fullfíggjað uppskot, sum nevndin fer at taka støðu til.

Hetta eru trý spennandi uppskot, sum hvør í sínum lagi, koma at broyta húsið munandi – bæði innan og uttan.

Nevndin hevur gjørt sær sínar tankar um, hvat av uppskotunum vit halda skal veljast. Støðan er tann, at vit eru noydd at gera broytingar, tað sleppa vit ikki undan. Her kann eg nevna, at áleina oljurokningin kostar okkum alt ov stórar upphæddir, so tað sigur seg sjálvt, at vit hava ein trupulleika, sum má loysast.

Tá tað snýr seg um kjallarahæddina, so eigur her at vera nevnt, at hon verður nógv útleigað til tiltøk av ymiskum slag. Talan er privatar fyritøkur og almennir stovnar, sum brúka hølið t.d. til fundir og skeið. Og so leiga privatfólk eisini ofta hølini til ymiskar hátíðardagar.

Her hava vit tvær uppgávur, sum mugu loysast saman; tað snýr seg bjálving og at fáa eina útluftingarskipan í kjallarahæddini.

## Útlendingar í Føroyum

Vit hava verið á fundi við Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í almannamálum viðvíkjandi útlendingum, sum eru í Føroyum og starvast. Vit hava dømir um persónar, sum hava starvast her ein stóran part av teirra arbeiðslívi, teir hava goldið øll sosial gjøld, tó uttan at hava nakra vissu fyri um teir nú hava rætt til t.d. fólkapensión ella part av hesum. Hesir persónar fáa sum rímiligt er ikki – ella í besta føri niðursetta pensjón í heimlandinum. Landstýriskvinnan var jalig, og samd við okkum í, at hetta er órímiligt og, at sjøtul eigur at setast á at rætta hetta; annaðhvørt við avtalu landanna millum ella við undantaksreglu, sum landstýriskvinnan hevur heimild til at seta í verk. Ein av trupulleikunum, sum tey førdu fram var, at føroyingar eru úti fyri tí sama, alt eftir hvar í heiminum teir arbeiða, tí hevur hetta ikki verið høgt prioriterað. So er at vóna, at tað kemur uppá pláss. Livst so spyrst.

## Verkstova

Felag okkara er virt av føroyskum stovnum og aðalráðum.

Vit fingu sum einasta fakfelag í Føroyum innbjóðing til at luttaka á ráðstevnu, sum varð skipað av Uttanríkistænastuni. Orsøkin til tað er helst okkara góða samstarv við norska EL & IT forbundet. Ráðstevnan snúði seg um Føroyar og Arktis / avbjóðingar og vinnumøguleikar.

Hetta var eitt sera áhugavert tiltak.

## Marknagilsdepilin

Lat meg her fyrst nevna, at eg í fleiri ár havi sitið í stýrinum fyri Tekniska Skúla í Tórshavn. Í hesum sambandi havi eg haft høvi at fylgja drúgvu tilgongdini, sum bygging av Marknagilsdeplinum hevur haft. Men nú eru vit loksins komin har til, at spakin ella hakin er settur í.

Nakað av skriving tók seg upp í sambandi við, at tað var so stórur munur á innkomnu tilboðunum; sjálvur var eg ikki sørt ivingarsamur.

Vit hava haft fund við fyritøkuna, sum átti lægsta tilboðið, fyri at fáa greiðu á, hvat vendir upp og hvat vendur niður í hesum sambandi. Vit høvdu ein positivan fund við stjóran, og greiddi hann frá, at teir fyri tað mesta brúka undirleverandørar til at loysa uppgávur fyri seg. Tað vil siga, at teir sjálvir hava fá fólk í starvi. Tí síggja vit so lítið til, at



# ÁRSFRÁGREIÐING HAVNAR HANDVERKARA FELAG: ÁRIÐ 2012



okkara limir hava inntøku hjá teimun. Vit vístu á, at tað eigur at koma okkara limum eins og arbeiðsmonnum og øðrum til góðar, tá ein so stórur og umfatandi bygningur verður bygdur í Føroyum. Tað var eisini nevnt í viðgerðini, tá verklagslógin var fyri í tinginum og samtykt.

Semja var um, at hesi viðurskiftir skuldu koma uppá pláss, tí fyri fyritøkuna var tað líkamikið og eingin trupulleiki, at arbeiðsfólkið var „organiserað" har tey náttúrliga eiga at vera.

## Lokalpolitikkur

Lat meg her eisini vísa á, at tað er stórt spell, at lokalpolitisk áhugamál kunnu forkoma eini slíkari bygging einans av tí, at talan er um at byggja ein skúlabygning í høvuðstaðnum.

Søgan hevur víst okkum, at tað als ikki er eins trupult, tá byggjast skal aðrastaðni. Vit kenna onki til nakrar blokeringar, tá talan er um at byggja almennar bygningar uttanfyri Suðurstreym. Hinvegin kunnu vit vísa á, at ofta verða almenn byggjarí sett í gongd uttan fyri Suðurstreym áðrenn peningur er játtaður. Somuleiðis er vanligt, at bygt verður fyri nógv størri upphæddir enn játtan er givin til. Hetta snýr seg um bygging av almennum stovnum og kann tí ikki góðtakast.

So tað eru ikki øll økir í landinum, sum verða virðismett eins av okkara landspolitikarum.

Men nú er tí betur ferð sett á bygging av Marknagilsdeplinum; tað er bert at fegnast um. Vónandi heldur tíðarætlanin; tað er tí verri ikki altíð, at so er, tá bygt verður í Føroyum.

## ALS

Ein stór gøla tók seg upp í vár, tá stjórin hjá ALS seinastu árini fór frá. Tá kom fyri dagin, at hann hevði fingið ørandi upphæddir í fráfaringarløn.

Eg eri ein av teimum, sum meti hesa avtalu at vera eina háðan ímóti arbeiðsmarknaðinum, og ikki minst teimun arbeiðsleysu.

Ein persónur, ið sigur seg úr starvi, eigur sjálvandi ikki at fáa nakra fráfaringaravtalu ella, sum nevnt verður eitt gylt lógvatak.

Men tá tað er sagt so haldi eg avgjørt, at tað er stýrið fyri ALS, sum eigur apuna. Stýrið er als ikki uppgávuna vaksi, tá slíkt kann lata seg gera.

At nú fyrrverandi stjórin hevur kláráð at trilla stýrið um sín lítlafingur er flott klára av honum, men tað sigur samstundis nógv um tey, sum sita og hava sitið í stýrinum.

Vit mugu eisini seta spurnartekin við okkara umboð í stýrinum.

Tað er lætt at goyma seg aftanfyri tagnarskylduna, stýrislimir hava áður talað at, hví vóru øll so tigandi í hesum føri ?

Tá málið gjørdist alment var onkur stýrislimur frammi, og segði, at tey kendu seg pressaði til at skriva undir; og at tað var kotyma, at stýrið altíð var samt, tá avgerðir vóru tiknar. Slíkur pástandur haldi eg prógvar, at hesir stýrislimir als ikki eru búnir til at sita í einum stýri.

So leingi sum allur sannleikin ikki kemur fram, verða bert gitingar manna millum, so einasta rætta fyri trúvirði í stýrinum var, at alt stýrið fór frá. Hetta sum hendi kunnu partarnir, ið varða av ALS, ikki liva við. Haldi ikki, at stýrisformaðurin einsamallur eigur alla ábyrgdina av hesum.





Linde Gas | AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútsgerð
Kolgass

*Upplatingartíðir :*
móna, -fríggjadag
8:00 - 17:00
Tlf. 315544
e-mail: Gassola@gassola.fo
**www.gassola.fo**



**Húsavarðartænastan**

Brattalíð 8 | Tórshavn | hvt@olivant.fo | Tel. 29 00 29



# OGNA TÆR TÍN EGNA HÚSAVØRÐ

- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.







**Reinsa við turr-ísi**

Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing. Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.

**Betong-saging**

Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm. Ring og hoyr nærri.









*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í sambandi við bygging, umbygging og viðlíkahald av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum...*

# Nýggjan køk?

- vit hjálpa tær at finna dreymakøkin






**NÝGGJUR SVARTUR EKSLUSIVUR OG ELEGANTUR KØKUR**

Nýggjasti mótin innan køkar í løtuni er svart og hvítt. Tiskil hevur Aubo framleitt nýggju lúkuna Melinga Svart, sum beinan vegin bleiv ein bestseljari. Melinga fylgir mótanum, køkurin er einkul, stílreinur og longu blonku handtøkini eru eitt grafiskt íkast til beinu linjurnar.

Vit hjálpa tær fegin við at tekna køkin, soleiðis at hann hóskar júst til tín. Tú skalt bara taka mát av rúminum. Til ber eisini at síggja fleiri køkar frá á www.2x3.fo.

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

Heykavegur 4 · 110 Tórshavn · Tel. 311250 · 2x3@2x3.fo · www.2x3.fo

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo




BYGMA BALSLEV






ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo



Sofus Joensen, formaður í Eftirlønargrunninum

Nú vit – gott og væl – eru komin inn í 2013 og líta aftur á 2012, rennur mær í huga, at vit á seinasta aðalfundi greiddu tykkum frá, at tað ikki hevði gingið so væl sum undanfarin ár. Men nú kunnu vit siga, at árið 2012 roynd-ist væl hjá Eftirlønargrunninum. Og hóast vit í 2012 hava styrkt tann partin av grunninum, sum hevur við okkara lívrentu at gera, so eru vit før fyri at hava eina rentu upp á 6% fyri 2012. Tað má sigast at vera sera gott.

## Eitt gott barometur

Eitt gott barometur fyri um ein eftirlønar-grunnur hevur haft eitt gott ár er at hyggja at, hvussu stór rentan er, ið latin verður limunum. Vit høvdu eina rentutilskriving upp á 5 % í 2009. Seinni kom undan kavi, at okkara eftir-lønargrunnur var næstbestur í danska ríkinum. Tað eru vit sera stolt av enn. Í 2010 høvdu vit eina rentutilskriving upp á 4,5 %, og má tað sigast at vera heilt gott sum tíðirnar eru.

Í 2011 høvdu vit vánaligasta árið nakrantíð. Tað hevði sínar heilt greiðu orsøkir. Tá var rentan bert 1,5 %. Hyggja vit yvir eitt tíðarskeið upp á 3 ár, so hava vit eina miðalrenta upp á 3,7 %.

Leggja vit so 2011 afturat, har rentan var 6%, ja, so hava vit eina miðalrenta upp á 4.25 %.

Meta vit okkum so saman við hinar báðar stóru veitararnar, liggja vit nakað væl omanfyri teirra rentu. Ikki so galið, at vit kunnu standa okkum so væl samanborið við størsta pen-sjónsgrunnin í Føroyum „LÍV“ við lands-kassanum sum garanti og „Betri Pensjón“ við Tryggingarfelagnum Føroyar í rygginum – ein heiður, ið ikki er okkum beskorin – ja, so er úrslitið heilt gott.

## Íløgur

Vit í nevndini í eftirlønargrunninum hjá Havn-ar Handverkarafelag hava altíð haft sum mál at vera sera varin við íløgum. Tí sum allir ser-frøðingar á økinum siga: jú størri váða tú tek-ur upp á teg – jú størri er møguleikin fyri skjótum vinningi – og tað er ein sannroynd, at so er – men tað, sum vit eisini skulu vera heilt ivaleys í, er, at tað líka so væl kann verða øvugt. Í staðin fyri at vinna pening, so missa vit hann. Tað er helst ein av orsøkunum til, at vit liggja so væl fyri við rentutilskrivingini til limirnar. Vit hava ongantíð mist pening. Tað hava aðrir gjørt í stórum stíli. Vit passa so sera væl upp á okkara pening.

## Eftirlønir

Aftur í ár siga okkara fólkavaldu, at tað kemur ein nýggjur pensjónsreformur – t.v.s. at politikararnir umsíðir eru vaknaðir og hava samtykt millum annað, at hvør einasti løn-móttakari skal gjalda inn í ein góðkendan eftirlønargrunn. Tað, ið miðað verður eftir, er, at landskassin heilt ella partvíst skal sleppa undan at gjalda pensjónir til okkum. Teir ein-astu, ið eru undantiknir eru politikarar og tænastumenn. Hjá teimum er ikki neyðugt at brúka 15% av síni løn til eftirløn. Teir miða eftir, at Landskassin framhaldandi skal gjalda teirra eftirlønir. Sum nú er, verður øll A-inn-tøka mótroknað av fólkapensjónini. Tað, ið vit fáa útgoldið í eftirløn, er at rokna sum ein A inntøka, og fer hetta tí at vera mótroknað. Eisini hava okkara fólkavaldu fingið eyga á, at har liggja nakrar krónur, sum tey fegin vilja hava fingrarnar í. Jóannes Ejdesgaard, táver-andi landsstýrismaður í fíggjarmálum, gjørdi í sínari tíð greitt, at eftir hansara hugsan skuldi verið ein almennur eftirlønargrunnur, sum um-sat allar eftirlønir í landinum. Eg haldi so avgjørt, at tað hann segði, má hava verið skemt.

Hann førdi millum annað fram, at pening-urin lág nógv betur í Landskassanum enn hjá pensjónsfeløgunum ella bankunum.

Ja, hvat halda tit ?





## Flatskattaskipanin

Nú er sjón fyri søgn, nú rokningin fyri flatskattin liggur í tinginum. Tað eru tey lágløntu, tey gomlu og tey sjúku, ið skulu fíggja fullu lummarnar hjá teimum ríku. Játtanarkarmarnir eru einki minni enn ein vanvirðing av teimum eldru, ið hava lagt lunnar undir land okkara, og ein niðurgerð av teim lesandi, ið útbúgva seg at føra landið víðari.

Tíverri má ásannast, at við verandi gongd verður heldur talan um eina endurreisn av einum fyrrverandi vælferðarsamfelagi, enn eina víðariføring. Núverandi politiska stýrið førir okkum beint út av eggini.

Lyftini vóru mong áðrenn valið, og einki tyktist vera ómøguligt, men so kom flatskatturin og tann kaldi veruleikin. Lyftini bóru fleiri valevni inn á ting, men innkomin skiftu tey ham.

Nú skuldi gildið gjaldast.

## 2012

Í januar 2012 varð nýggj pensjónsskattaskipan sett í verk – saman við flatskattaskipanini.

Nýggja pensjónsskattaskipanin merkti, at farið varð frá at skatta pensjónir við útgjald, til at skatta pensjónir við inngjald. Samstundis broyttist kapitalpensjónsskatturin úr 35% upp í 40%. Eisini broyttist skatturin á luta- og lívrentupensjón frá at vera skattað sum A inntøka við útgjaldi (tvs. við botnfrádrátti og progressivari skattaskipan) til at verða skattað við 40 % frá fyrstu krónu.

Ein verulig flatskattaskipan varð sostatt sett í verk fyri føroyskar pensjónir. Hetta var ein skipan, ið hækkaði eftirlønarskattin, og tók burtur fíggjarligar fyrimunir við at velja sjálvboðið at spara upp til pensjón, heldur enn at fáa upphæddina útgoldna sum løn. Og nú kemur tað løgna: Heldur enn at bøta um hesa støðu, so velur landsstýrið nú at koma við lógartvungnum inngjaldi til pensjón fyri allar føroyingar.

Hetta verður gjørt uttan samstundis at taka støðu til, hvat hendir við útgjaldinum av lógartvungna inngjaldinum. Eitt nú viðvíkjandi møguligari mótrokning v.m. Hetta skapar framhaldandi ótryggleika á føroyska pensjónsøkinum.

## Ognarrætturin

Eitt annað, ið ikki hóvar mær er, at tey fólkavaldu siga ikki, hvussu vit skulu taka ein part av lønini og spara upp til aldurdómin.

Tey fara eisini inn á okkara pensjónskonti, sum vit longu hava goldið skatt og øll onnur gjøld av, og so siga tey okkum, hvussu vit skulu fáa okkara egna pening útgoldnan. Tað haldi eg vera grovt.

Í paragraf 73 í grundlógini stendur, at „ejendomsretten er ukrænkelig".

Vit hava eftir hesum § frælsi til at ráða yvir ogn okkara, ráða yvir hvørjum vit loyva inn á ognina, hvat vit gera innanfyri egnu fýra veggir, so leingi vit ikki skaða onnur. – Mær rennur Sámal Mattias, rekamannin hjá Jens Paula Heinesen í huga – § 73 í grundlógini hjálpti heldur ikki honum nakað serligt.

## Bíðið við uppskotinum

Fyrivarnini hjá pensjónnýskipanarbólkinum eru fleiri. Millum annað sigur bólkurin:
„Verður eftirlønaruppsparing skattað við inngjald, so verður eftirlønarskatturin goldin av





framtíðar borgarum. Skattagrundarlagið verður tí tengt at, hvussu nógv eru í arbeiðsstyrkini til ta tíð.

Inntøkugrundarlag landskassans verður tí ikki so trygt sum við gomlu skipanini".

Fakfeløgini heittu á politiska myndugleikan, um ikki at seta ætlanina at skatta pensjónsinngjøldini í verk á nýggjárinum 2012. Biðið varð um, at politiski myndugleikin gjørdi fleiri útgreiningar, áðrenn avgerð varð tikin, men sama gjørdi.

„At skatta eftirlønir við inngjald við tí í huga at lata tær skattafríar útaftur viðførir, at botnfrádrátturin hvørvur saman við broyting av skattatíðspunktinum. Sami persónur fær tí í veruleikanum minni at liva av enn við fyrrveranda skipan. Uppskotið fær helst sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar, við tað at skattaviðurskiftini broytast munandi hjá lág- og miðal lønarfólki."

Nógv verður bæði sagt og skrivað um fyribrigdið «fólkaræði/demokrati». Hvussu skal hetta fyribrigdið virka sum heild:

Skulu 4 ár ganga ímillum, at fjøld av føroyingum fáa sína hugsan hoyrda? Vit velja eitt umboð á ting fyri ein flokk. Mangar avgerðir tiknar á tingi hava alstóran týdning fyri – og ávirkan á – hvønn einstakan føroying. Mangar teirra stríða beinleiðis ímóti fólksins besta og fólksins vilja.

## Skal tað so kallast fólkaræði ella demokrati?

Tykist mær, sum tað er eitt einasta fólkaræði, sum verður virt á Føroya Løgtingi í dag: Fólkaræðið hjá teimum vælbjargaðu.

Takið eitt nú seinasta dømið:
Fleiri fakfeløg hava sent skriv til Føroya Løgting og víst á misnøgd teirra við pensjónskipanina.

Áhugavert verður at sjá, um hesi fakfeløg fáa eina virðiliga viðgerð av teirra áskoðan, og um lurtað verður eftir teimum … Tykist ikki so.

„Eg skal tó vissa øll um, at farið verður ikki fram í óðum verkum, og at málið verður viðgjørt væl og virðiliga, áðrenn nøkur umskipan verður sett í verk".

Hetta sigur løgmaður. Eg veit ikki, hvat vit skulu leggja í tað. Higartil er alt farið fram eftir fummum, tá vit tosa um eftirløn og skatt.

## Munurin ímillum rík og fátøk

Munurin ímillum rík og fátøk hevur ongantíð verið størri seinastu 30 árini, enn hann er nú.

Ein orsøk til hetta er, at skattalætti verður latin teimum hægstløntu. Men tað eru eisini aðrar orsøkir. Hetta er niðurstøðan, sum Landsbankin ger burtur úr eini nýggjari frágreiðing yvir gongdina í OECD londunum.

– Hendan kanningin avdúkar, at búskaparligur vøkstur ikki av sær sjálvum gagnar øllum í samfelagnum, og at størri ójavni ikki førir við sær, at tey fátækastu fáa møguleika fyri: „at arbeiða seg uppeftir" burtur úr fátøku tilveruni, endurgevur Landsbankin stjóran í OECD at siga …

Tað tykist sum málið er at flyta skattabyrðuna og fíggingina av vælferðartænastunum enn meira yvir á miðal- og láginntøkubólkarnar, meðan hægstu inntøkubólkarnir fáa ein veruliga stóran lætta.

## Brúkaragjøld

Brúkaragjøld, har øll gjalda tað sama uttan mun til inntøku, verða tá einasti háttur at fíggja vælferðartænasturnar. Príshækkingar og øktir kostnaðir fara at raka lægru inntøkurnar harðast.

Sagt í stuttum: Samgongan virkar sum ein øvugtur Robin Hood, ið tekur frá teimum veiku til frama fyri tey, ið hava mest.

Sum sagt: Tað er so nógv, sum verður kallað sosialisma. Fyri mær er tað eitt samfelag, sum hevur javnbjóðis møguleikar fyri øll sum eitt av sínum aðalmálum. Tí kallast sosialdemokratisku flokkarnir í t.d. Fraklandi og Spania fyri sosialistaflokkar. Og tí skíra amerikanarar uttan himpr norðanlond sosialistisk. Men uttan kapitalismu, eingin sosialisma!



# EFTIRLØNARGRUNNURIN ÁRSFRÁGREIÐING 2012

Kapitalisman hevur verið tann vinnulívsskipan, sum hevur megnað at skapt nógv størstu virðini.

Samstundis sum hon er góður tænari og góður „motorur“, so er hon ringur harri.

Bara tvey ættarlið av ótálmaðari, óstýrdari kapitalismu uttan politiska umfordeiling – so hava vit ljóta andlitið á stættarsamfelagnum fyri okkum.



## Útreiðslur

Vanlig mannagongdin í sambandi við innkrevjing av umsitingargjaldi til grunnin hevur verið, at tikið hevur verið 5 % av tí, ið inn hevur verið goldið.

Hendan skipanin hevur rigga væl, men av tí at peningurin nú verður skattaður við inngjald, so mugu vit broyta inngjaldið frá 5 til 9 %.

Hetta fyri at fáa sama krónutal inn.

Kostnaðurin fyri at reka grunnin broytist ikki, hóast inngjaldið er lækkað við 40 %. Men lat meg eisini siga, at tað kostar ikki meira krónur fyri hvønn lim at gjaldið fer frá 5% til 9%.

Tað hevur nakað við skatting at gera, og tit fáa líka nógvar krónur út við tí nýggja leistinum sum við tí gamla.

## Starvsfólk

Eftirlitið við eftirlønargrunnum og bankum er hert hesi seinasti árini. Tað er nokk ein avleiðing av fíggjarkreppuni – og tað er bara gott, at eftirlitið er hert.

Eitt nú er bræv komi frá tryggingareftirlitinum viðvíkjandi førleika hjá nevnd og stjórn, tað sonevnda (fit & proper), har stendur: sambært § 49 stk. 1 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi skal ein limur í nevnd ella stjórnini hava nøktandi royndir til at røkja starvið ella uppgávuna í tryggingarfelagnum.

Í §49,stk. 2 verður ásett hvørjar treytir nevndarlimir/stjórnarlimir skulu lúka: „Tryggingarefturlitið skal við hesum biðja nevnd og stjórn um at lata eftirlitinum upplýsingar um tey í § 49 stk. 2 nevndu viðurskifti.“

Hetta setir størri krøv til okkara umsiting, nevnd og stjórn. Ein umsiting sum frammanundan ikki er stór. Tað, at vit hava eina lítla umsiting ger, at tað ikki er so dýrt at umsita pengingin í okkara grunni. Ikki nær til so dýrt sum t.d. at umsita „LÍV“ og „Betri Pensjón“ – fyri ikki at tala um nógvar danskar grunnar. Og her má sigast, at tey, sum starvast á skrivstovu okkara, og sum dagliga gera arbeiðið við at skráseta limir, sundurgreina eftirlønargjøld, kanna at arbeiðsgevarin flytur tað, ið hann skal, svara telefonum og nógv annað. Hesi fólk gera eitt stórt og týdningarmikið arbeiði.

Eg fari at takka teimum, og fara so langt sum at siga, at uttan teirra ágrýtni, var ongin eftirlønargrunnur: „Stóra tøkk fyri gott arbeiði til tykkum øll somul.“

## Ábyrgd

Eg fari við hetta høvi aftur at heita á tykkum, um sjálvi at ansa eftir, at tit fáa útgoldið tað, ið sáttmálin sigur. T.v.s. at arbeiðsgevarin flytur tað, sum hann eigur at flyta.

Her hugsi eg serliga um, at tit kanna eftir, um eftirlønin, sum er ein partur av løn tykkara, verður flutt til Eftirlønargrunnin.

Sjálvandi kanna skrivstovufólkini eftir, at alt verður goldið, sum skal vera goldið, men tað hevur týdning, at limirnir eisini fylgja gongdini.

Og við tykkara hjálp er lættari at tryggja, at einki kemur skeivt fyri.

Hetta eru tykkara pengar, og so skulu vit heldur ikki gloyma, at hetta eftir hondini er ein stórur partur av lønini. Og harvið eisini tykkara ábyrgd.


www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# EFTIRLØNARGRUNNURIN

| Rakstarroknskapur | 2012 kr. | 2011 kr. |
|---|---|---|
| Eftirlønargjøld | 19.717.451 | 30.119.595 |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 7.241.805 | 6.263.696 |
| Virðisjavningar | 5.622.911 | -3.953.488 |
| Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi | -1.707.160 | -577.258 |
| **Úrslit av íløguvirksemi til samans** | **11.157.556** | **1.732.950** |
| Útgoldnar veitingar | -4.577.145 | -1.292.271 |
| Broyting í eftirlønaravsetingum | -3.435.824 | -8.301.329 |
| **Útgoldnar veitinga og broytingar í avsetingum til samans** | **-8.012.969** | **-9.593.600** |
| Fyrisitingarkostnaður | -1.557.518 | -1.341.382 |
| Flutt úrslit av íløguvirksemi | -7.721.732 | -1.398.491 |
| **Tryggingartekniskt úrslit** | **13.582.788** | **19.489.072** |
| Íløguúrslit av eginognini | 7.721.732 | 1.398.491 |
| Skattur av ársúrsliti | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | **21.304.520** | **20.887.563** |

## Fíggjarstøða hin 31. desember 2012

| | | |
|---|---|---|
| **OGN** | | |
| **Fíggjarligar íløguognir** | | |
| Aðrar fíggjarligar íløguognir til samans | 206.916.431 | 180.461.623 |
| **Fíggjaríløgur til samans** | **206.916.431** | **180.461.623** |
| **Ogn í umferð** | | |
| **Tøkur peningur** | **5.052.455** | **5.546.574** |
| **Ogn í umferð til samans** | **5.052.455** | **5.546.574** |
| **OGN TIL SAMANS** | **211.968.886** | **186.008.197** |
| **SKYLDUR** | | |
| **Eginogn til samans** | **8.671.489** | **9.195.618** |
| **Ábyrgdarlán** | **5.000.000** | **5.000.000** |
| Limakontur | 153.769.635 | 131.940.986 |
| Eftirlønaravsetingar, solidariskar | 41.672.491 | 38.236.667 |
| Onnur skuld | 2.855.272 | 1.634.926 |
| **SKYLDUR TIL SAMANS** | **211.968.886** | **186.008.197** |



# SJÓNARHORNIÐ: DANJAL P. DJURHUUS



**Núverandi starv:** Prentmiðstøðin

**Aldur:** 53 ár.

**Maki:** Jensia Elisdóttir

**Børn:** Susan 33 ár, Elin 28 ár og Liljan 21 ár. 3 barnabørn.

**Handverkara útbúgving:** Bygningssnikkari.

**Læra byrjað:** August 1976

**Tekniski skúli:** Í Tórshavn.
**Útlærdur:** August 1980.
**Sveinastykki:** Úthurð.

**Arbeitt sum sveinur hjá:** Olaf Haldansen og byggifelag G. Waagstein

**Frítíðarítriv:** Havi neyst – bát og jakt.

**Besta bók:** Eingin bók er frammi men bløðini verða lisin.

**Besti sangur:** Tað er ringt at velja ein, tí tað er eitt ótal, men „imagine" hjá Lennon er eitt gott boð.

**Besti Filmur:** Dr. Civago.

**Er tað okkurt serstakt arbeiði, sum tú minnist væl:** Eitt arbeiði, sum vit gjørdu var ein tunnil uppi á Sornfelli í 1992, tað minnist eg væl.

**Hvussu eitur besti handverkarin, sum tú veit um:** Olaf Haldansen.

**Besti sjónleikari:** Har eru fleiri. Jákup Veihe, Súsanna Tórgarð og nógv onnur.

**Hvør heldur tú hevur mynda tín persón mest:** Foreldur míni.

**Hevur tú ein ella fleiri søguligar persónar, sum hugtaka teg:** Tað eru nógvir, so tað er ringt at taka ein einstakan fram um aðrar.

**Hvør er tín størsta fyrimynd:** Tað er pápi mín, sum ikki er millum okkum longur.

**Fartelefon:** Motorola.

**Telda:** hp.

**Bilur:** Mitsubitsi Galant.

**Hvat heldur tú um eftirlønina hjá Havnar Handverkarafelag:** Tað er ein týdningarmikil varði, sum handverkarnir kunnu verða ernir av.

**Hvat heldur tú um samlagstryggingina hjá Havnar Handverkarafelag:** Hon er góð og kann gerast betri.

**Hvat heldur tú er størsta avbjóðingin hjá einum handverkara í dag:** Tað er at halda seg uppdateraðan tí tað krevst temmiliga nógv av handverkaranum í dag.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:** Tá tað gongst øllum væl. Serliga teimum, sum av ymsum ávum hava verið illa fyri t.d. av óhappum, sjúku og deyða

**Hvat kann øsa teg:** Tá persónar eru negativir og einki ber til.

# UM FÓLKAPENSJÓNINA



Páll Nielsen, advokatur skrivar soleiðis um kunningina frá Almannaverkinum um fólkapensjónina:

## Vanligar treytir

Høvuðsreglan er, at tú bert hevur rætt til fólkapensjón um allar niðanfyri nevndu treytir eru uppfyltar:

Tú er danskur ríkisborgari ella er gift/-ur við ella seinast hevur verið gift/-ur við donskum ríkisborgara.

Tú hevur fastan bústað í Føroyum ella er starvssettur á føroyskum skipi, og tú hevur havt fastan bústað í danska ríkinum í minsta lagi í 3 ár.

Landsstýrismaðurin kann gera undantak frá treytunum. Somuleiðis kann undantak gerast samsvarandi sáttmálum við onnur lond.

## Undantak frá treytini um danskan ríkisborgararætt

Um persónur (sum ikki er danskur ríkisborgari) hevur havt fastan bústað í Føroyum í minsta lagi 10 ár, harav í minsta lagi 5 seinastu árini áðrenn pensjónsaldur, so kann landsstýrismaðurin gera undantak frá regluni um danskan ríkisborgararætt.

Landsstýrismaðurin kann eisini geva undantak, soleiðis at persónurin ikki neyðturviliga skal búgva í Føroyum eftir at hava fingið tillutaða (og fáa útgoldið) pensjón úr landskassanum. Umsókn um frávik skal sendast Almannastovuni, sum sendir umsóknina til Almannaráðið.

## Nordisk Konvention om Social Sikring

Í Nordisk Konventión verður undantak gjørt frá omanfyristandandi reglum viðvíkjandi ríkisborgararætti o.a.

Sáttmálin javnsetir borgarar í øllum Norðurlondum soleiðis, at ein norðurlendingur, sum hevur búð og/ella arbeitt í tveimum ella fleiri Norðurlondum, kann hava rætt til pensjón í fleiri londum.

Nordisk konvention om Social Sikring ásetur eisini, at pensjónin kann verða útgoldin til norðurlendskar ríkisborgarar, sum eru fastbúgvandi í einum EBS-landi (ES- og EFTA-landi).

Konventióni setir tí úr gildi treytirnar um ríkisborgararætti og føstum bústaði.

## Innvinnan av pensjón fyri bústaðartíð

Full pensjón í Føroyum er treytað av í minsta lagi 40 ára bústaðartíð í danska ríkinum millum 15. og 67. árið fyri fólkapensjónistar og fyri fyritíðarpensjón í minsta lagi 4/5 av árunum frá fylta 15. árinum til óarbeiðsførið verður staðfest.

Hevur bústaðartíðin í Føroyum verið styttri, minkar pensjónsútgjaldið í mun til styttru bústaðartíðina.

Hevur viðkomandi búð í einum øðrum Norðurlandi, hevur hann møguliga vunnið sær rætt til pensjónsútgjald í viðkomandi landi, sum supplerar upp til fulla pensjón.

Ein norðurlendingur vinnur sær rætt til pensjón í mun til bústaðartíðina í tí einstaka Norðurlandinum. Pensjónin verður útgoldin í mun til bústaðartíðina í hvørjum landi sær.

## Full pensjón

Full pensjón er 40/40. Pensjónin kann so verða býtt millum tvey ella fleiri lond í mun til bústaðartíðina. T.d. kann ein pensjónistur fáa 35/40 av pensjónini í Føroyum og 5/40 í Noregi, um hann hevur búð 35 ár í Føroyum og 5 ár í Noregi millum fylta 15. og 67. árið.

Fyri flestu pensjónir er minstamark fyri rættinum til pensjónsútgjald, at bústaðartíðin í viðkomandi landi hevur verið í minsta lagi 3 ár.

## Innvinnan av pensjón fyri arbeiðstíð

Í nøkrum Norðurlondum, t.d. Noregi, eru partar av pensjónini treytaðir av arbeiðstíð í landinum og av, at løntakarin hevur goldið inn til sosialu trygdarskipanina í landinum.

Tá kann talan verða um útgjald, um viðkomandi hevur arbeitt og goldið sosial trygdargjøld í eitt ár í minsta lagi.

Pensjón við flyting millum ríkispartarnar Føroyar, Grønland og Danmark eru sum kunnugt í einum ríki (stati), so bústaðartíðir í ríkispørtunum verða samanlagdar. Pensjónin verður útgoldin sambært galdandi lóg í tí ríkisparti, har viðkomandi býr. Tað ger sostatt ongan mun, hvar í ríkinum, ein føroyingur hevur búð.

Tá ein fólkapensjónistur flytir til Danmarkar, flytir hann uttan umsókn yvir til danska fólkapensjón.

Ein fyritíðarpensjónistur kann ikki flyta beinleiðis yvir til danska ella grønlendska fyritíðarpensjón, men má søkja av nýggjum. Grundin til hetta er, at fyritíðarpensjónirnar eru vorðnar so ymiskar, at tær ikki longur kunnu samanberast.

*Páll Nielsen, adv.*


aquatherm
BAXI
ROYAL SCANDINAVIAN
VØLUND VARMETEKNIK
Nýtt orku-konsept
frá Demich og Magn:
Allar orkuloysnir til sethús
og virkir á einum staði
Les meira um nýggja
orku-konseptið og
Magnline oljuketilin á
demich.fo/orkuhus
SALTANGARÁ
Heiðavegur 80
Tel. 200 380
TÓRSHAVN
Stiðjagøta 2
Tel. 200 300
VÁGUR
Á Marknoyri
Tel. 560 370
HITAPUMPUR
KETLAR
VENTILATIÓN
RØR OG FITTINGS
BAÐIRÚMSMØBLAR
GOSBAÐ
Saltangará
Tórshavn
Vágur
demich
HVS-VEITARIN
TIL VINNUNA
Okkara døgntænasta er at hitta á tel. 200 345
Tí velja handverkarar Demich
Vit veita bestu ráðgevingina
Vit eru landsdekkandi
Vit umboða dygdarvørur
Vit hava kappingarførar prísir
Vit hava góða kundatænastu
Vit hava døgntænastu
Vit hava framkomnar blikksmiðjur
Á smiðjuni í Havn kunnu vit tilevna
inndekningar upp til 3 m
demich
Hiti • Ventilatión • Sanitet
Okkara dygd – tín trygd!
www.demich.fo


Glarmeistarin v/Poul Guttesen.
Søla og montering av
lágorkutermorútum,
u-virði niður í 0,4.
Einkultglas, spegl, herða glas
til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo
Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466


elmek
v/Magnus Magnussen • Gripsvegur 18 • FO-100 Tórshavn
tel 317352 • far 217700 • elmek@post.olivant.fo
Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl


mazda
Tann nýggi 6'arin er komin
ZOOM-ZOOM
mazda6
Bilasølan
www.mazda.fo




**Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum leggur lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.**

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni



**Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón